Guðrið Dam Andreasen

Fra: Høgni J. Høgnesen (Betri) <hjh@betri.fo>
Sendt: 24. august 2020 15:18
Til: Katrin Thorsvig Hansen
Cc: Høgni J. Høgnesen (Betri)
Emne: Uppskot til løgtingslóg um yvirvøku við myndtatóli
Vedhæftede filer: Yvirvøka við vakmyndatóli.pdf

Góðan dag, Katrin

Viðfest sendi eg uppskotið aftur við mínum viðmerkingum skrivaðum í hond í sjálvt skjalið.

Í tí donsku lógini verður orðið "pengeinstitut*virksomheder*" brúkt í § 2, stk. 1. nr. 3).

Í "TV-overvågningsloven med kommentarer", Petur Blume, verður viðmerkt til hetta:

"Udtrykket pengeinstitutvirksomed omfatter banker, vekselkontorer og posthuse, der fungerer som ekspedition for pengeinstitutter."

Í notuni í Karnov verður sagt:

"Pengeinstitutvirksomhed omfatter banker, vekselkontorer og posthuse, der fungerer som ekspeditionssted for pengeinstitutter i relation til samme type virksomhed.

Í uppskotinum verður orðið "peningastovnar" brúkt. Eg dugi ikki at siga, um tað er nakar trupulleiki.

.....

Í § 10, stk. 6 í uppskotinum verður sagt:
"Í málum um brot á hesa løgtingslóg kann *húsa*rannsókn fara fram eftir reglunum í retsplejelov for Færøerne um *húsa*rannsókn í málum, sum hava við sær frælsisrevsing."

Í tí donsku lógini um tv-yvirvøku verður orðið "ransagning" brúkt. Orðið "Ransagning" fevnir í "straffiprocessini" um rannsókn av húsum ella visitatión av persónum til tess at útvega prógv ella lutir, ið hald skal leggjast á. Tað er ógreitt fyri mær, um orðið "**húsa**rannskókn" fevnir um hesi bæði ella bara rannsókn av húsum.

Blíðar heilsanir | Best regards

Høgni J. Høgnesen
Løgfrøðingur
Stjórnarskrivstovan
hjh@betri.fo

betri

Tel. +298 348572 Fartelefon. +298 548572
Betri Banki, Yviri við Strond 2, FO-100 Tórshavn, www.betri.fo

Hugsa um umhvørvið. Prenta bert henda teldupost út, um tað er neyðugt.